# Frælsi, atkoma og Barcelona

LEILA SOLMUNDE
forkvinna í MBF



Frælsi er eitt hugtak, sum stendur sterkt í altjóða ræ一indum og í øllum sáttmálum, sum eru knýttir til menniskja rættindi.

Tó stendur hugtakið frælsi serliga týðiligt, tá tað er tengt at hugtakinum tvang, eksklusjón, isolasjón, og í øðrum formum í samband við at fólk verða útistongd í at luttaka á jøvnum føti.

Hava so fólk við brekið hetta frælsi, at tey ikki verða útistongd, ella isoleraði í okkara demokratiska samfelag, sum Føroyar tykjast at vera?

Er okkara samfelag so atkomuligt í breiðastu merking, at fólk saktans kunnu virka uttan at møta forðingum, sum til dømis at útbúgva seg eftir fríum ynski, sleppa at velja sær sítt arbeiði eftir tí tær dámar at gera, síggja og hoyra allan føroyskan tíðindaflutning og.s.fr?

Tað er ein sannroynd, at fólk við breki verða útihýst dag og dagliga í dagsins samfelag.

Dømi um hetta er, tá fólk ikki kunnu fara á matstovu, til eina framsýning, eina konsert, inn handlar, inn í biohøllir, umborð á eina ferju ella við einum bussi, tí hesi ikki er atkomulig fyri rørslutarnað. Hesum forðingum møta fólk við brekið hvønn dag.

Eitt annað dømi er tá føroyskar tíðindasendingar og aðrar sendingar ikki eru atkomuligar við teksting og tulking. Úrslitið er at ein partur av Føroya fólki eru sett uttanfyri, og tískil hyggja at útlendskum tíðindum sum eru atkomulig, og kunnu ikki fylgja við í føroyskum tíðindum. Hesi fólk hava eitt skert frælsi, og verða útistongd frá tí, sum onnur halda er ein sjálvfylgja at njóta í samfelagnum.

Tá ið tað kemur til atkomu fyri rørslutarnað, sum eg best kenni til persónliga sum koyristólsbrúkari, rann mær í huga nakað eg las fyri kortum, tá ein almennur stovnur setti sær ein visjón fyri framtíðina. Hesin stovnur nevndi fótbóltsliðið hjá Barcelona, og ynskti at brúka tað sum fyrimynd. Liðið hjá Barcelona hevði ikki serliga góða eydnu, fyrrenn nýggjur hugburður kom á liðið, at stríðast saman fyri at náa bestum úrslitum. Tá eg las hetta rann mær í huga, hvat Barcelona eisini er kent fyri, og tað er ikki bert fótbólti, nei býurin er skírdur atkomuligasti býður í Evropa.

Barcelona er mest umráðandi handils-íðnaðurog havnabýur í Norður Spania, og stendur fyri 20 % av bruttotjóðarinntøkuni, hóast ber 15 % av íbúgvunum í Spania búgva har.

Hann er kendur fyri sín arkitektur, sína mentan og fyri at hava nógv gomul hús, gøtur og sera stórsligin bygningsverk.

Myndugleikarnir í Barcelona settu sær fyri, at brúka eitt 10 ára skeið uppá at gera býin atkomuligan fyri fólk við brekið. Í dag er hann skírdur at vera eitt "Mekka" fyri fólk við rørslutrupuleikum, við tí úrsliti, at ein hópur av ferðafólkum koma til býin, og hann hevur fingið eitt alheimsmerki á seg sum besti atkomuligi býur í Evropa.

So kann man spyrja, tá tað ber til har, kann tað so ikki bera til her í Føroyum? Jú, er svarið frá mær. Um man setir sær fyri, at so skal verða, so ber tað sjálvandi til.

Men tað merkir, at øll mugu gera sítt til, at fáa tað at bera til. Landsins myndugleikar, kommunur, byggifrøðingar, arkitektar og fólk, ið virka á økinum.

Veruleikin er, at vit hava ongar lógir og ongar reglur á økinum. Alt er eftir fríum vilja. Ofta kemur man umaftur tá bygt verður, og tá gerst tað dýrari.

MBF hevur í áravís gjørt vart við trupulleikan, og gjørt ymisk átøk fyri at fáa myndugleikarnir at virka fyri, at fáa lógarbundin krøv, sum kundi bøtt munandi um støðuna.

ST- sáttmálanum um vernd og rættindi hjá fólki í bera brek áleggur, at hesi viðurskiftir skulu tryggjast borgarum við breki, og tí síggja vit fram til, at á ráðstevnuni sum MBF skipar fyri mikudagin 3. dec, at fáa at vita frá Landsstýriskvinnuni í Innlendismálum, hvussu langt man er komin at fáa til vega tílíkar heimildir.

Tíðin er komin í einum framkomnum samfelag, at tað kann gerast ein natúrligur partur, tá samfelagið bjóðar tænastur fram, at tær røkka øllum borgarum

# Blokkroykur í Marknagili

TÓRBJØRN JACOBSEN



Ein, ið rópar seg Reidar Nónfjall, lítur nú inn í ein slíkan sorta, at hann sær fyri sær, at føroyingar noyðast ta tungu og eyðmýkjandi gongd, at biðja donsku stjórnina um at hækka ríkisveitingina aftur, skal lív vera lagað fólkinum, ið her býr. Sosialurin ruddar forsíðuna fyri oraklinum. Sjálvsagt. Hetta hóskar í krammið. Tað ræður um at taka vónina og neistan frá fólkinum. Sleggjan hjá imperialismuni veit, nær ið løtan er. Fyri fleiri árum síðani ruddaðu teir eisini forsíðuna, táið táverandi formaður Sambandsfloksins útbasuneraði, at ríkisveitingin var fyritreytin fyri lívi í oyggjunum. Fullveldislandsstýrið kutaði tíanbetur somikið av blokkinum, at hann í veruleikanum er 800 milliónir krónur lægri um árið í dag, enn hann hevði verið, um onki varð gjørt tá. Sama landsstýrið hevði yvirskot á løgtingsins fíggjarlóg øll árini – samlað slakar 3 milliardir í sløk 6 ár. Vil tvíhalda um, at tað var bjarta málinum um fullveldi fyri at takka. Síðani settust búskaparligu pyromanarnir í ABC-samgonguni við heimastýrisradiatorarnar úti í Tinganesi. Um tað var tilvitað ella ikki, kann gitast um, men floksfelagarnir hjá hesum fjallinum Nón, sum nú er farin at skjóta við kanón, tó við øgiligari spjaðing í høglunum, torpederaðu búskapin, m.a. við einum ørvitiskendum skattapolitikki, og eru beinleiðis orsøkin til ringu støðuna, vit nú sita í. Tað er lagnunnar speisemi, at oddviti Javnaðarfloksins, sum lat seg dragsa runt í borgarligu manesjuni, fyri at sita sum galliónsfigurur í danska heimastýrinum, nú skal sita og súpa sín egna dárskap upp úti í Albert Hall.

Tikið verður til í greinini í Sosialinum, um forfattaran Nónfjall, at hann er búskaparfrøðingur og stjóri á Føroya Handilsskúla. Ætlanin var tí at spyrja mannin, um hann í hesi niðurgangsgreinini umboðar seg sjálvan, Sambandsflokkin, sum hann er ein oddviti í, stýrið fyri Føroya Handilsskúla ella starvsfólkini á skúlanum? Um svarið er ja, merkir hetta so eisini, at stýrið og starvsfólkini eru líka hugað sum stjóri teirra, fyri at hække ríkisveitingina aftur? At smíða stórt slátur úti í Marknagili fyri at fóðra føroysk ungmenni við hesi sjúkligu pessimismuni, hesum svarta íhaldi og himinrópandi vónloysi mann neyvan vera serliga skilagott. Eru alternativar røddir á hesum skúla, sum enn hava so frægt av lívsmóti, at tey enn troysta sær, at stinga beinini út um songarstokkin í lýsingini, so áttu tey kanska at gjørt vart við seg. Annars kunnu tey, sum skulu játta pening til nýbygging skjótt fara at ivast í, um samfelagið hevur nakra framtíð við einum skúlaskapi, har evsta leiðslan hevur slept vónini um, at næmingarnir í heila taki hava nakra framtíð í einum samfelag, sum sambært honum er dømt til at miseydnast. Fái accosiatiónir aftur til eina tekning hjá Óla P. í Stavninum, har ein litteratur situr og kikar niður í nalvan á sær sjálvum. Universið gerst trongligt, táið fokuspunktið gerst so sjálvsupptikið og avlagað.

# Tollfríar sigarettir ella koppseting móti krabbameini

SOFUS DEBES JOHANNESEN



"Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, er fegin um, at uppskotið um at tolla sigarettum verður tikið aftur".

Soleiðis er eitt brot í grein á InternetSosialinum í kvøld. Samstundis hevur Tjóðveldi uppskot í løgtinginum um, at ungar føroyskar gentur skulu koppsetast móti krabbameini.

Hesum seinna hjá Tjóðveldi eri eg sera samdur við teimum í. Men hvaðani kemur fíggingin?

Eg haldi, at Tjóðveldi í hesum føri – sum í so mongum øðrum – tosar móti sær sjálvum.

Sjálvandi skulu 12-15 ára gamlar føroyskar gentur koppsetast móti krabbameini, men hetta skal eisini gjaldast.

Um vit droppaður tollfríu sigarettirnar, so gav hetta landskassanum 18 milliónir meira um árið, og so kundu saktans tvær av hesum verið brúktar til koppseting av ungum gentum móti krabbameini, meðan restin kundi verið nýtt til annað – kanska innan heilsuverkið, ið hevur stóran tørv á fígging at betra heilsu okkara.

Hyklarí hjá Tjóðveldi av fyrstu skuffu! Ikki fyrstu ferð, men so sanniliga ikki síðstu ferð, heldur.

# Hava vit brúk fyri frelsu ella dómadagspredikantum?

JÁKUP DANIELSEN



Fyri umleið 20 árum síðani fóru fólk at gera seg klók upp á gongdina í samfelagnum. 80 ára veitslan hevði ein enda tikið, og maður kom kropp á kroppi og greiddi Føroya fólki frá, hvussu illa stóð til í samfelagnum. Ivi var sáddur um, um tað var liviligt í Føroyum og at grasið var grønari aðra staðni enn heima hjá okkum sjálvum.

Hendan vanlukkuliga gongdin helt á fram, og í 1992 var boðskapurin komin út um landoddarnar, soleiðis at danska fíggareftirlitið eisini vildi verða við í hesum kórinum av fólki sum bert vilja síggja trupulleikarnar heldur enn at arbeiða við møguleikunum.

Øll kenna vit gongdina tá. Vit trýstu fleiri túsund føroyingar av landinum. Her bleiv ikki liviligt, og nógv vóru tey, sum komu í fíggjarligt ófør. Arbeiðsloysisskipanin var stovnað og klárari nóg illa at breyðføða tey, sum komu tvørs fyri.

Ein kendur vinnulívsmaður segði tá, at ringt var í 20'unum, verri var í 30'unum og 50'unum, men so ringt sum í fyrst í 90'unum hevði tað ongantíð veri. Sethúsaeigarar høvdu bundið seg til ovurhonds stóra skuld saman við at allir almennir kassar vóru tómir. Peningastovnarnir ridlaðu, og vit og teir máttu hjálpast við fíggjarligum lánum úr Danmark.

Tey sum áttu pening á bók vistu ikki síni livandi ráð. Øll høvdu fingið at vita, at nú mátti haldast aftur, tí samfelagshjólið mól skjótari enn gott var.

Og nú eru vit á veg inn aftur í hesa negativu umtaluna. Øll halda andanum, tí tú veitst ikki, hvat morgindagurin hevur at bjóða. Eftirklókskapur og prædika um, hvussu illa stendur til, er at lesa í bløðunum og at hoyra í tíðindasendingunum.

Tá tú sáar iva, so fara fólk at ivast.

Spælitímin á altjóða peningamarknaðinum er liðugur, og vit lata okkum draga við hesum, men stendur tað so illa til, sum dómadagspredikantar vilja verða við? Er tað ongin sum vil tala um frelsu?

Mín meining er, at vit skulu halda uppat við at lata okkum draga av slíkum negativum tosi. Lat okkum heldur tosa um, hvussu vit kunnu byggja hetta landið. Í mun til 90'ini hevur landskassin tað gott, og vit hava eina arbeiðsloysisskipan, sum er fíggjarliga væl fyri.

Tey sum eiga pening mugu fyri guðs skyld ikki lata seg ávirka av hesi negativu umtalu, tí gera vit tað, so eru vit viðvirkandi til at stegða samfelagshjólunum, og tað er tað ongin sum vil.